

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 02 - 2012

# Oljufeløgini skulu ansa eftir hvalinum

Tá oljufeløgini um stutta tíð fara at biðja grønlendsku myndugleikarnar um loyvi til at gera seismiskar kanningar úti fyri vesturgrønlendsku strondini, fáa tey harðari treytir, enn myndugleikarnir hava sett fyrr. Tey herdu krøvini hava sín uppruna í, at danskir serfrøðingar longu síðsta summar ávaraðu um avleiðingar av teimum seismisku kanningunum hjá skotska felagnum Cairn Eenergy í Vesturgrønlandi. Sambært blaðnum Ingeniøren vístu serfrøðingarnir á, at tær sterku ljóðbylgjurnar, sum verða sendar ígjøgnum sjógvin í sambandi við seismiskar kanningar, kunnu órógva hvalir so mikið, at teir gerast bangnir og rýma burtur frá leiðum, har teir annars eru friðaðir. Enn hava myndugleikarnir í Nuuk ikki givið nøkrum felagi loyvi til seismiskar kanningar í ár. Landsstýrið hevur fingið fýra umsóknir um kanningar í Baffinvíkini, men Ove Karl Berthelsen, landsstýrismaður í ráevnismálum, sigur við KNR, at umsóknirnar verða kannaðar bæði væl og virðiliga, áðrenn nakað loyvi verður latið. Samstundis verða treytirnar herdar. Eitt nú verður tað álagt oljufeløgunum at skipa fyri nágreiniligum kanningum, sum skulu staðfesta ferðamynstrið hjá hvalinum í økinum undan, undir og aftan á tær seismisku kanningarnar. Harafturat skulu feløgini samstarva við lokalar veiðimenn fyri at vita, um tær seismisku kanningarnar órógva møguleikarnar hjá veiðimonnunum. Grønlendsku myndugleikarnir vænta, at sjey av teimum oljufeløgunum, sum hava leitiloyvi í Vesturgrønlandi, fara at søkja um loyvi til at gera seismiskar kanningar í ár.